Føroya Ferðaleiðarafelag:

# Ókeypis túrar í Havnini við ferðaleiðara

TÍÐINDASKRIV

Í sambandi við mentunarnáttina 1. juni skipar Ferðaleiðarafelagið fyri trimum ókeypis túrum í Havnini við ferðaleiðara. Hvør túrur er umleið 1 tíma.

Vit bjóða tveir túrar út í Tinganes, har tann eini verður á íslendskum máli. Harumframt verður ein túrur í vesturbýnum.

Allir túrarnir byrja framman fyri Gamla Bókhandil/Kunningarstovuna - og eru okeypis.

Túrarnir út í Tinganes byrja kl. 19.00 og túrurin í Vesturbýin umleið 1 tíma seinni, tvs. uml. kl. 20.00.

Øll eru hjartaliga vælkomin, og ikki er neyðugt við tilmelding. Tit møta bara upp framman fyri Gamla Bókhandil/Kunningarstovuna til ásettu tíðirnar. Ferðaleiðararnir eru lættir at kenna, tí teir eru í okkara bláu og grønu jakkum.

Vit vóna at nógv nýta hetta høvið at hoyra meira um Havnina.




*Ferðaleiðararnir mentunarnáttina eru f.v.: Gunhild V. Michelsen, Haldane Joensen og Jóhanna Trausadóttir. Haldane Joensen er formaður í Føroya Ferðaleiðarafelag*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Marius Olsen í Galerie Focus

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 1. juni kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Mariusi Olsen upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Marius Olsen er ein av okkara bestu grafikarum. Hann arbeiðir við ymiskum grafiskum framburðum og setir ymiska tøkni saman. Myndirnar eru sjáldsamar og hava sermerktan poesi.

Framsýningin verður opin til 14. juni, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.




*Málningur hjá Mariusi Olsen*

Eik Banki:

# Finn Danberg tilnevndur undirstjóri



*Leiðslubólkurin í Eik banka f.v. Øssur Nolsøe, leiðari fyri deildunum í Suðurstreymoy, Kollafjørð og Sandoy, Bjarni Olsen, stjóri, Marner Jacobsen, forstjóri, Bogi Bendtsen, undirstjóri og Finn Danberg, undirstjóri*

*Kelda: www.eik.fo*

Í sambandi við komandi børsskrásetingina á VMF og Københavns Fondsbørs ger Eik nú tillagingar í bygnaðinum. Endamálið er, at samtakið verður betri skipað til tess at taka við teimum avbjóðingum, sum eitt nú komandi børsskrásetingin krevur

Í sambandi við tillagingina av bygnaðinum er Finn Danberg tilnevndur undirstjóri frá frá 1. juni 2007. Soleiðis verða tveir undirstjórar í Eik Banka, Bogi Bendtsen og Finn Danberg.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hjørdis í Jansagerið** fer til gravar úr Miðvágs kirkju mikudagin 30. mai klokkan 14.00. Tey, sum vilja minnast Hjørdis kunnu lata eina peningagávu til Miðvágs kirkju, konta í peningastovninum

Hvítusunnudag andaðust **Rosa og Ditleif Eldevig, Fuglafjørður.**

**Dagurin**

**31. mai. Petronella**, deyð umleið ár 100. Ein kend halgikona í fornkirkjuni. Halgisøgan sigur, at hon var dóttir Pætur ápostul, men tað skal helst skiljast sum andaliga dóttir hansara.

## Summarframsýning 2007 í Snarskivuni

Galerie Focus skipar eisini fyri summarframsýningini í Snarskivuni. Framsýningin letur upp mentanarnáttina fríggjadagin 1. juni kl. 15 – 22 og endar 15. august.

Við á framsyningini eru: Jógvan Asbjørn Skaale, Jóna Rasmussen, Heðin Kambsdal, Eyðun av Reyni og Amariel Norðoy

TØKK

Vit takka hjartaliga øllum tykkum, sum við heilsanum, uppringingum ella á annan hátt sýndu okkum, starvsfólkum okkara og familjum teirra samkenslu, tá ið MS Hercules brendi og vit mistu 11 av okkara góðu starvsfólkum.

THOR